




## Støðan er álvarsom

*Hanus Hansen, reiðari hjá JFK-Troli um støðuna, nú eingin fiskiveiðisáttmáli er við Noreg og ES.*

**Hvat merkir tað fyri tykkara skip, at eingin fiskiveiðisáttmáli fæst í lag millum Føroyar og Noreg í 2011?**
- Verksmiðjutrolarin Gadus missir helst fyri einar 30 miljónir krónur í veiðivirði í hesum árinum. Umleið 25% av kvotunum í Barentshavinum hvørva, tá eingin fiskiveiðisáttmáli er við Noreg. Hetta svarar til umleið 30% av veiðivirðinum, sum var umleið 108 miljónir í fjør.

**Hvat ger, at meir fæst fyri fiskin í norskum sjógvi?**
- Fiskurin í norskum sjógvi er vanliga størri enn fiskurin í russiskum sjógvi. Soleiðis fæst eisini meiri fyri hendan fiskin.

**Hvussu er støðan við Nærabergi, sum fiskar uppisjóvarfisk?**
- Næraberg sleppur helst hvørki í norskan sjógv ella ES-sjógv í ár. Hetta merkir, at Næraberg kann ikki fiska sild í norskum sjógvi, ei heldur sild og nebbasild í ES-sjógvi.

**Og samanumtikið?**
- Hetta er álvarsamt, og hetta er fyrstu ferð í 100 ár, at einki føroyskt skip sleppur at fiska í norskum sjógvi, sigur Hanus Hansen.

# Stokkarnir glinta í Fuglafirði



*Bindiklubbar gera eisini útferðir*

## Leygarkvøldið klokkan 19 koma bindiklubbarnir í Fuglafirði saman til eitt felags stokkakvøld í Mentanarhúsinum

Randi Jacobsen

Sum ein avleggari til torradagarnar í Klaksvík verður bindiklubbakvøld í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið. Frits Johannesen hevru tikið stig til tiltakið.

Har verður bæði felagssangur, framførdur tónleikur og sangur, sjónleikur og frásagnir.

Frits Johannesen fer at bjóða vælkomin út frá orðatakinum: Neyð lærir nakna kvinnu at spinna.

Randi Sigurðsdóttir Vang, døturnar og Jónhild Johannesen fara at hugleiða um samljóð og samvirðir, og Mathilda Abrahamsen fer at tosa um elsta bindiklubban í Fuglafirði. Hon hevur myndir av bindiklubbanum.

Ein lítil skemtileikur um ein gulan bil, húsarokk og ein grán ford verður framførdur av Mimi Steintórsdóttir, Kristinu Joensen, Frits Johannesen og Niels Midjord.

Fleiri kvinnur hava myndir og fara at siga frá sínum bindiklubbum.

Sjúrður Skaale er boðin við til at halda røðu fyri stokkakonunum.

Petur Martin Petersen hevur yrkt sangin stokkarnir glinta, ið verður sungin sum felagssangur. Gentukórið gamla fer at syngja fleiri sangir, og Poul Jakku Lundsbjerg spælir á harmoniku.

## Í MORGIN

4/7 °C




Hvassur vindur ella skrið av landsynningi, seinnapartin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.

## MIKUDAGIN

4/7 °C




Strúkur í vindi ella hvassur vindur av eystri, seinnapartin minni vindur av landsynningi. Regn av og á og hitin millum 4 og 7 stig.

## HÓSDAGIN

3/6 °C




Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 0 og +4 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 993 hPa. skamt norðan fyri Føroyar fer í útnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 993 hPa. við Írland kemur hendavegin.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið skamt sunnan fyri Føroyar fer í útnyrðing.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 95 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -5 | Tromsø | -- | Moskva | 0 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 2 | Bergen | 0 | Berlin | 5 | Beijing | 0 |
| Tórshavn | 4 | Oslo | -9 | Paris | 13 | New Dehli | 19 |
| Lerwick | 3 | Stokkhólm | -4 | Madrid | 8 | Bangkok | 31 |
| Aberdeen | 4 | Keypmannah. | 0 | Róm | 13 | Sydney | -- |
| London | 13 | Helsinki | -6 | Malorca | 16 | New York | 0 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 6. febr. | Mánin longst frá jørðini |
| 11. febr. | Fyrra kvarter |
| 18. febr. | Fullmáni |
| 19. febr. | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. feb. | 03:00 | 15:25 | 02:00 | 14:25 | 02:15 | 14:40 | 05:00 | 17:25 | 06:00 | 18:25 | 01:15 | 13:40 | 00:15 | 12:40 | 03:15 | 15:40 | 04:15 | 16:40 | 02:45 | 15:10 | 04:00 | 16:25 |
| 15. feb. | 03:51 | 16:17 | 02:51 | 15:17 | 03:06 | 15:32 | 05:51 | 18:17 | 06:51 | 19:17 | 02:06 | 14:32 | 01:06 | 13:32 | 04:06 | 16:32 | 05:06 | 17:32 | 03:36 | 16:02 | 04:51 | 17:17 |
| 16. feb. | 04:43 | 17:08 | 03:43 | 16:08 | 03:58 | 16:23 | 06:43 | 19:08 | 07:43 | 20:08 | 02:58 | 15:23 | 01:58 | 14:23 | 04:58 | 17:23 | 05:58 | 18:23 | 04:28 | 16:53 | 05:43 | 18:08 |
| 17. feb. | 05:33 | 17:58 | 04:33 | 16:58 | 04:48 | 17:13 | 07:33 | 19:58 | 08:33 | 20:58 | 03:48 | 16:13 | 02:48 | 15:13 | 05:48 | 18:13 | 06:48 | 19:13 | 05:18 | 17:43 | 06:33 | 18:58 |
| 18. feb. | 06:18 | 18:42 | 05:18 | 17:42 | 05:33 | 17:57 | 08:18 | 20:42 | 09:18 | 21:42 | 04:33 | 16:57 | 03:33 | 15:57 | 06:33 | 18:57 | 07:33 | 19:57 | 06:03 | 18:27 | 07:18 | 19:42 |